Kunngerð

Roknskapirnir fyri 1999 hjá Tórshavnar kommunu og Tórshavnar havn liggja til alment eftirlit á býráðsskrivstovuni frá 13. juni 2000 til 27. juni 2000.

Tórshavnar kommuna

Honda Civic 15i Vetec til søls

Árg. juni 98, koyrt 44.000 km, er sera væl hildin. Ikki er roykt í bilinum. Bilurin er myrkagrønur.

Meira fæst at vita á

tlf. 448860 ella **457628**

Ídnaðarøki á Sandvíkahjalla til søls

Við hesum verður eitt ídnaðarøki á Sandvíkahjalla lýst til søls. Økið er til víddar 3.727 m² og liggur væl fyri.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skrivstovu okkara.

Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøta 9

Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Friða Patursson, adv. Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

Tlf. 311145

KN tag
Det bedste over hovedet...
- også på Færøerne

- Tagpapdækning
- Efterisolering med Rockwool
- Tagrenoveringer
- Tagreparationer
- Renovering af skiffertage

Op til 15 års garanti

Medlem af DTBs Garantifond

KN Tagdækning A/S
www.kn-tag.dk - E-mail: post@kn-tag.dk
Bredalsvigvej 1 • Humlum • 7600 Struer
Tlf. 0045 **97 86 17 33** •
Fax 0045 97 86 12 05
Kimsvej 1 • 7500 Holstebro
Tlf. 0045 **97 40 19 33**
Industrivej 15 • 7700 Thisted
Tlf. 0045 **97 92 61 33**
Ring og få et godt tilbud.

Kontakt vore medarbejdere på taget hos Ide Møbler, Tórshavn, i juni og juli

Frá Havnar Arbeiðsmannafelag

Eykaaðalfundur

Við hesum verður kallað inn til eykaaðalfund
í Havnar Arbeiðsmannafelag
og
Eftirlønargrunni Havnar Arbeiðsmannafelags
leygardagin hin 24. juni 2000 kl. 17.00
á Hotel Føroyum
við hesi dagsskrá:

Fyri fundin hjá Eftirlønargrunninum:
1. Kunning um fíggjarligu støðu grunnsins.
2. Uppskot til nýggjar viðtøkur.

Fyri fundin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag:
1. Uppskot um at veita Eftirlønargrunninum ábyrgdarlán.

Bussur koyrir frá Vaglinum 20 min. áðrenn fundin og oman aftaná.

Nevndirnar

Seat Ibiza 1,9 diesel til søls

Árg. 5/99, sportsfelgur, gáttir, tokulyktir, cd-anlegg, servicebók. Ikki er roykt í bilinum. Prísuppskot 125.000 kr.

Tlf. 448223 ella **218398**

Pedagogur

Innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlinum á Rúnarvegi í Runavík, er eitt tænastumannastarv sum pedagogur leyst at søkja frá 1/8-2000.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sett eftir sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt í lønarflokki 11/17 + viðbót.

Bústovnurin og Sambýlið á Rúnarvegi er heim hjá 12 menningartarnaðum fólkum, við ymiskum tørvi á hjálp og vegleiðing.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðufólkið á tlf. 448424.

Skrivlig umsókn við prógvi, viðmæli v.m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 1/7-2000 og skal sendast til:

Bústovnin
Rúnarvegur
Att: Fyristøðufólkið
FO-620 Runavík

Neyst í Havn

Vegna Føroya Skiftirætt verður eitt neyst í Álakeri og gamalt 5-mannafar við hesum lýst til sølu.

Neystið stendur á leigaðum øki næst við innara oljutangan hjá Statoil. Neystið er 8,5 m langt og 2,8 m breitt (mált innan).

Skiftirættin tilskilar sær rætt at velja millum innkomnu tilboðini ella ikki at taka av nøkrum.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

Advokatskrivstovuna
Fr. Petersensgøta 9
Att: Fríða Patursson, adv.

Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Friða Patursson, adv. Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

Tlf. 311145

Lærarar

Tórshavnar skúlaráð søkir eftir 36 lærarum til kommunalu skúlarnar í Tórshavnar kommunu skúlaárið 2000/2001.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2000/2001, verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Til Kaldbaks skúla
1 lærara at undirvísa umleið 19 tímar um vikuna.

Til Argja skúla
5 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna.

Til Eysturskúlan
12 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna.
2 lærarar at undirvísa niðursetta tíð.
1 lærari (vegna barnsburðarfarloyvi) at undirvísa 26,5 tímar frá skúlaárs byrjan.

Til Kommunuskúlan
4 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna.

Til Venjingarskúlan
4 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna.
1 lærara at undirvísa 20 tímar um vikuna.

Til Sankta Frans skúla
3 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna.

Til Hoyvíkar skúla
2 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna.
1 lærara at undirvísa umleið 25 tímar um vikuna.

Meir fæst at vita
um størvini frá skúlastjórunum ella Tórshavnar skúlaráði, Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 315160.

Umsókn
Umsóknir til størvini skulu verða Tórshavnar skúlaráð, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 12. juni 2000.

Tórshavnar skúlaráð

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3010

Navn: Sp/f KT-Centrum
Hjánøvn: Sp/f Skeið og EDV-útbúgving (Sp/f KT-Centrum), Sp/f KT-skúlin (Sp/f KT-Centrum), Sp/f MEGA-skúlin (Sp/f KT-Centrum), Sp/f MEGA-tænastan (Sp/f KT-Centrum), Sp/f MEGA-service (Sp/f KT-Centrum), Sp/f Telduskúlin (Sp/f KT-Centrum) og EDV-skúlin (Sp/f KT-Centrum).
Adressa: N. Finsensgøta 21, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 04.05.2000
Viðtøkudato: 04.05.2000
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Í/F Mega við Mark Joensen og Jan Petersen, Tórshavn og Sámal Bláhamar, Tjarnarlág 41, 100 Tórshavn.
Stjórn: Sámal Bláhamar, Tjarnarlág 41, 100 Tórshavn og Mark Joensen, Tórgarðsgøta 19, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: : Sp/f HanSam, Óli Hansen, skrásettur grannskoðari, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 04.05.2000 - 31.12.2000
Endamál: Endamál felagsins er skeiðvirksemi umframt onnur vinna ið stendur í samband við nevnda rakstur.

Skráseting Føroya tann 7. juni 2000

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3013

Navn: Sp/f Bjørgvin
Adressa: 490 Strendur
Kommuna: Sjóvar Kommuna
Stovningardato: 17.05.2000
Viðtøkudato: 17.05.2000
Kapitalur: Kr. 235.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 235.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Suni Jacobsen, 490 Strendur.
Stjórn: Suni Jacobsen, 490 Strendur.
Tekningarreglur: Felagið verður tekna av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2000 - 31.12.2000
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, handil og aðra vinnu í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 7. juni 2000

Kristin Balle

Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

Dagrøktarmammur

Kommunala Dagrøktarskipanin í Kollafirði søkir eftir dagrøktarmammum at byrja 14. aug. 2000.

Umsóknir skulu sendast til Dagrøktarskipanina í Kollafirði, 410 Kollafjørður, í seinasta lagi fríggjadagin 30.06.2000.

Kollafjarðar Dagrøktarskipan

Góð hølir í Tórshavn til leigu

Ovara hædd á bygninginum Slættanesgøta 5 til leigu. Samlað støddd 200 m². Vælegnað til felagshølir, umsiting, fundir, undirvísing, skrivstovuyrki o.a.

Tlf. 314414 · Fax 318045

Søkt verður eftir Pedagogi

Vøggustovan við Velbastaðvegin søkir eftir einum pedagogi vegna barnsburðarfarloyvi 30 tímar um vikuna, at byrja 1. okt. 2000 til 16. mars 2001.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum er normeraður til 40 vøggustovubørn, 10 børn eru inni á hvørjari stovu.

Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevnir og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.

Um eingin pedagogur søkir starvið, verður hjálparfólk sett í staðin.

Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 30. juni 2000.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran Ingu-Mariu Amandusardóttir ella varaleiðaran Elsu Nielsen.

Vøggustovan við Velbastaðvegin
Velbastaðvegur 39 · 100 Tórshavn
Tlf. 314379 · Fax 321179

Kantinu-fólk

Søkt verður eftir fólki at taka sær av matstovuni, harundir matgerð til 20-25 fólk, innkeyp og upprudding.

Dentur verður lagdur á starvsroyndir og/ella útbúgving.

Arbeiðstíð kl. 10.00-13.30.

Nærri upplýsingar á tel. 351123.

Skrivlig umsókn í seinasta lagi 26. juni.

FØROYA
LÍVSTRYGGING
Quillinsgarður
Postboks 206
110 Tórshavn

FØROYA LÍVSTRYGGING

Ársaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá Suðuroyar Kunningarstovu verður á Kunningarstovuni mánadagin 10.07.00 kl. 17.00.

Suðuroyar Kunningarstova

Pedagogur og hjálparfólk

Býlingshúsið á Ternuryggi søkir eftir pedagogi og hjálparfólki at byrja í august.

Størvini
Talan er um eitt pedagogstarv, 30 tímar um vikuna og eitt hjálparfólkastarv, 30 tímar um vikuna í vøggustovu við 11 børnum at byrja 7. august 2000. Eitt hjálparfólkastarv, 30 tímar um vikuna, í barnagarðsstovu við 22 børnum at byrja 7. august 2000.

Føreikakrøv
At tú hevur góð samstarvsevnir, hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einsataka barninum, foreldrum og starvsfeløgum. Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

Setunarviðurskifti
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri. Um pedagogur ikki verður settur í starvið, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Meir fæst at vita
um størvini við at venda sær til Nicolinu Skaalum, leiðara, tlf. 318626, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 315160.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum á Ternuryggi, Turiðargøta 9a, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 3. juli 2000. Tilskila á umsóknina hvat starv tygum søkja.

Tórshavnar kommuna

Frá Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag

1. uppstillingarfundur til býráðsvalið í Tórshavnar Kommunu verður mikudagin 14. juni kl. 19 á Landsbókasavninum.

Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag

Felagsskúlin á Oyrarbakka

Søkt verður eftir lærara tíðarskeiðið frá 16.10 2000 til 12.10.2001.

Starvið er tíðaravmarkað og verður lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir skulu sendast til Felagsskúlan á Oyrarbakka í seinasta lagi 21.06.2000.

Nærri fæst at vita hjá skúlastjóranum, tlf. 422084 ella tlf. 423098.

Felagsskúlin á Oyrarbakka
FO-450 Oyrarbakki